# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Felags stevnu fyri móðurmálið

Tað er við ørkymlandi stúran, at vit lesa niðurstøðuna hjá einum av okkara fremstu málfrøðingum í blaðnum í gjár: "Tað hevur havt fylgjur fyri almenna orðaskiftið, at fólk ikki tora nóg væl at samskifta á móðurmálinum, tí tey ikki halda seg duga nóg væl føroyskt", sigur hann.

Eivind Weyhe var endurgivin úr bókini hjá André Niclasen, sum verður løgd fram í Miðlahúsinum í dag. Hann segði, at tað er eitt afturvendandi trauma hjá nógvum føroyingum, at teir halda seg ikki duga nóg væl føroyskt – og at onkur hevur pátikið sær definitiónsrættin uppá, hvat føroyskt er.

Vit eru ikki øll samd um, hvønn málpolitikk, vit skulu reka. Og tað skulu vit heldur ikki vera. Men tað er sera umráðandi, at vit skilja og virða sjónarmiðini hjá hvør øðrum, um vit eru málreinsarar – puristar, ella vit vilja hava fremmand orð í føroyska málinum.

Tað er ógvuliga harmiligt, at politikkur er komin í málkjakið. Tað er staðfest so ofta, at víðgongdur tjóðskapur – nationalisma – hevur ført nógvar ólukkur við sær. Tó at føroyingar ikki hava verið í vápnaðum mál- ella tjóðskaparstríði, so eru óneyðuga nógvar kreftir spiltar burtur til onga nyttu í hesum stríði. Og tey, sum ikki hava tikið undir við "tí rætta málpolitikkinum", hava verið skírd sambandsfólk og tað, sum verri er. Heldur enn at taka felagstøk, so hevur tjóðin staðið spjadd.

Bókin hjá André Niclasen, "Føroya mál á manna munni", er higartil størsta verk, sum gongur beint ímóti linjuni hjá puristunum. Tí er bókin er eitt sera gott íkast til orðaskiftið – og vónandi kann hon verða við til at byggja brýr millum sjónarmiðini.

Vit skulu sjálvandi fegnast um, at tað hepnaðist V. U. Hammershaimb og øðrum at endurskapa skrivtmálið – og søgan hevur prógvað, at tað bar til at endurskapa eitt mál, sum var farið av gravarbakkanum. Men vit kunnu eisini geva Heðini Brú rætt, tá hann í brævi til Christian Matras í 1950 ávarar ímóti at taka málstríðið uppaftur: "Hví koma við einum páfunnum føroyskum? Vit hava esperanto...", sigur Heðin Brú.

Vit skulu varða um málið. Men vit skulu ansa eftir, so málið ikki verður ov konserativt og stirvið. Málið er altíð ment, og tað skal framhaldandi mennast. Globaliseringin ávirkar eisini málið, henni kunnu vit ikki renna undan. Tí er umráðandi, at vit finna eina felags málstevnu, Føroyum, føroyingum og málinum at frama.

**Sosialurin**

## Teir munnu ikki fara at svíkja, tá ástendur

**GERHARD LONGBERG**



~~løgtingsmaður og~~
borgarstjóri Skopun

Nú kom so stjørnuskotið úr flokkinum og gav mær ábreiðslur fyri at brúka meg ímóti embætisfólki, jú eg átti at tikið við læru, men fari ikki at gera tað.

Men fari heldur at sita árvakin, klárur at møta hvørjum sniðálopi frá teimum, sum so gjarna vilja jarðleggja okkara vakru Sandoy og ikki minst prýðismerki Sandoyar, Skúoyar og Dímunar. Tí tað er nokk av teimum, sum eru klárir at loypa í tann skansan, har fjøldin stillar upp.

Annars havi eg verið við til hesi fýra árini at atkvøtt stórmál ígjøgnum, sum eru øllum Føroya landi at frama, so eg havi ikki ringa sannvitsku, um eg kempi fyri Sandoyar tunnilinum.

Góði floksfelagi, hví útseta Sandoyartunnilin í 2 ár. Um anleggslógin ikki verður samtykt nú, so kemur hon ikki.

Dugur tú John ikki at síggja, hvussu meiningsleys orðini hjá Magna Laksafoss eru, hann meinar bara Sandoyartunnilin sum nakað, sum fer at upphita okkara búskap, hví fer Magni Laksafoss ikki ein túr inn í okkara høvuðsstað, Tórshavn, at finna okkurt, sum upphitar, ella runt Føroyar. Men Magni Laksafoss fór har sum hann helt garðurin var lægstur.

Sær tú ikki tað John Johannesen? Okkara oyggj er avskorin frá so nógvum, um vit taka flakavinnuna, so hava teir ómetaligar forðingar við flutningi bæði til og frá. Handverakarar, sum skulu kappast ímóti miðstaðarøkinum hava ongan møguleika, øll arbeiðsfólkini í Sandoynni, sum eru við at arbeiða á miðstaðarøkinum og eru limir hjá arbeiðsmannafelagnum og -kvinnufelagnum, muga vera heimanífrá í einar 10 til 11 tímar. Hetta eru fólk sum eiga børn, er tað halbart John Johannesen ella Magni Laksafoss?

Eru til klárir yvir, hvat tað er, sum tit royna at fáa okkara høga ting at gera?

So eg fari at royna at rópa neyðarróp á tingfólk um at hjálpa okkum fáu í Sandoyarsýslu tó álíkavæl um 1300 fólk og ikki sum journalisturin royndi í dag at venda tí til, meðan hon tosaði við talsmannin fyri øll valfeløgini í Sandoynni.

Hon fekk tað at ljóða, í middagssendingini, sum um bleiv Sandoyartunnilin gjørdur, so beindi vit fyri Føroya landi.

Sjalvt smábørnini tosa um tunnilin og um tey, sum eru ímóti. Ein smádrongur steðgaði meðan eg royndi at fáa ullina av einum seyði.

- Hin maðurin sum var hinaferð í Skopun

Smádrongurin hevði sett nøsina inn í Samljóð, har tingmanning floksins hevði fund. Drongurin helt á at tosa og segði:

- Tú Gerhard, hin maðurin sum skrivar ímóti tær, hann hevði orðið, eg minnist hvat stóð ovast, flokkurin møtir fólkinum.

Eg líkasum fekk sagt, jú jú tað var John Johannesen.

- Jamen, helt drongurin áfram, eg helt hann verða fittan og vildi hjálpa okkum so vit kunnu sleppa til Havnar til ítrótt av øllum slag.

Jú, eg fekk líkasum orðið aftur, hann er nokk fittur. Drongurin helt áfram at tosa, meðan eg royndi at fáa mítt arbeiði liðugt, tí henda langa hálsutta ærin hevði eisini hug at ótolnast.

- Jú abbi mín sigur, at John Johannesen og Magni Laksafoss hava erklerað kríggj ímóti Skopun og sandoyingum, tí Magni vil heldur ikki, at pápi fær sjómannsfrádrátt, hann tjenar næstan einki við hasum bátinum. Jú, helt hann, at teir vóru farligir, tí annar hevði kovboyklæðir so teir kundu verða farligir.

Eg fekk orðið aftur, meðan hin minni stakk hondina í buksulumman og kom uppaftur við tveimum bommum sum sóðu so sum so út, og fekk boðið annað, eg tók av meðan ærin fekk einki.

Nú fekk eg orðið aftur og bar eg í bøtuflakka fyri hesum unga politikkaranum. Nei góðin, hasir eru ungir og sjálvsagt vilja verða valdir á ting, og royna teir at tekkjast sínum veljarum, og helt eg áfram, teir munnu ikki fara at svíkja, tá ástendur.

Jú, soleiðis segði smádrongurin sum, um heilsan verður, einaferð skal seta krossin.

Eg fari at enda og ynskja føroyingum góða ólavsøku.

Enda við einum ørindi úr yrkingasavninum hjá H. J. Glerfoss

*Standi stinnir synir sterku*
*háðið hatska hevndarbál*
*brátt vil búgvið sigursmerki*
*veitra hátt við vunnu mál*

## Kann Sandoyartunnilin bíða?

**EYÐUN MOHR VIDERØ**



Fíggjarligu umstøðurnar hava sett stóra ferð á búskapin, og nú verður tosað, um tað ikki er neyðugt at steðga á og tálma hesur stóru samferðsluíløgunum.

Tá byrjað varð at gera tann fyrsta undirsjóartunnilin, ið var til Vágarnar, vóru mong, ið ivaðust um tann tekniska partin, at gera ein tunnil undir havbotninum, og um hesin ikki fór at kosta nógv meir, enn játtaðu upphæddirnar søgdu, og var hetta sjálvandi, tí ongar royndir hesum viðvíkjandi vóru at miða seg eftir. Hetta arbeiði gekk væl, helst betur, enn nakar tordi at vóna, og framhaldið við tunnlinum til norðoyggjar hevur víst tað sama.

Politikarar settu tí út í kortið, at tá liðugt var til Norðoyggjar, so skuldi haldast fram til Sandoynna. Vit hava onki annað hoyrt síðan tá, enn at hetta var ætlanin, so sjálvsagt hava bæði sandoyggjafólk og onnur, ið ynskja at flyta til Sandoynna at búgva, sett sítt álit á hesa verkætlan. Upplýst verður hiðani, at umleið 60 grundstykki eru umbiðin í ymisku bygdunum, og sjálvandi er hetta í vissuni um, at tunnilin kemur skjótt.

Í dag síggja vit, at gjørdu tunnlarnir hava ein áður ókenda ávirkan á umstøður og trivna fyri hesi økini og samstundis fyri landið.

Tí er tað, at vit í Sandoynni kenna tað sum heilt avgerandi fyri framtíðina hjá fólkinum her býr, og eisini fyri tey, ið ætla at flyta higar, eins og fyri tey ið skulu setast í búgv fyrstu ferð og ynskja at búgva í Sandoynni, at vit við einum tunnli eru hava javnari ferðasamband alla tíðina, bæði hvat viðvíkur flutningi av ráværu til virkingar og vørur annars eins og flutning av arbeiðsfólki, ferðafólki v.m., og harvið eru vit eisini nærri miðøkinum, sum í hesum tíðum er ein partur av arbeiðs- og trivnaðarumstøðunum. Tosið um yvirupphitaðan búskap kann ikki viðføra, at tunnilsarbeiðið verður útsett ella steðga, tí tað verður enn verri fyri landið sum heild, um Sandoyggin verður slept upp á fjall við einum „køldum“ búskapi!

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.